SKÚLIN VIÐ LØGMANNABREYT

# Summarroynd 2024

**Góðu næmingar og foreldur í 8. flokki**

Várroyndirnar standa nú fyri framman. Til kunningar er at siga, at várroyndirnar, eins og jólaroyndirnar, eru “venjingarroyndir” har næmingarnir fáa høvi til at fyrireika seg til endaligu próvtøkuna í 9. flokki. Niðanfyri eru tíðir og lærugreinir at síggja og á baksíðuni verður kunnað um reglur og forskriftir.

Blíðar heilsanir Skúlin við Løgmannabreyt

Høgni Joensen
Skúlastjóri

Próvtøkuumsiting: Jón Kragesteen - 510449 - jon.kragesteen@skulin.fo

| **Skrivlig summarroynd** | **8. flokkur** |
|---|---|
| **Føroyskt**<br>mikudagur 22. mai 2024 | 08:15 – 09:45 Máluppgáva<br>09:45 – 10:15 Steðgur<br>10:15 – 13:45 Framseting |
| **Støddfrøði**<br>hósdagin 23. mai 2024 | 08:15 – 09:15 Fimisrokning<br>09:15 – 09:45 Steðgur<br>09:45 – 13:45 Greiðslurokning |
| **Danskt**<br>fríggjadagin 24. mai 2024 | 08:15 – 09:45 Máluppgáva<br>09:45 – 10:15 Steðgur<br>10:15 – 13:45 Framseting |
| **Enskt**<br>mánadagin 27. mai 2024 | 08:15 – 09:45 Máluppgáva<br>09:45 – 10:15 Steðgur<br>10:15 – 13:15 Framseting |

**Vend**

# Reglur um royndir

**Reglur**
- Næmingarnir skulu sita klárir í royndarhølinum, fimleikarhøllini, kl. 08:00 dagsetta dagin.
- Um so er, at næmingur møtir ov seint, skal viðkomandi møta á skrivstovuni
  - ella ringja til Jón á 510449.
- Um næmingur ikki fær møtt, skal skúlin hava boð frá foreldrunum um tað.
- Í royndarhølinum er friður!
- Hevur næmingur spurning, skal hondin verða rætt upp, og so er at bíða til vaktin kemur. Loyvt er ikki at rópa ella at gera annað tekin.
- Næmingar hava ikki loyvi til at reisa seg frá stóli sínum, uttan við loyvi frá vakti.
- Næmingar skulu ikki samskifta við nakran annan enn vaktirnar.
- Fartelefonir skulu vera sløktar og lagdar á avtalað stað.
- Næmingarnir hava frí, tá royndarhaldið er liðugt og skulu fara heim tá.

## Brot á fyriskrivaðu reglurnar kann føra til burturvísing

**Føroyskt, danskt og enskt**
- Royndirnar verða gjørdar á skulatelduni hjá næminginum, sum teir hava við í skúla
- Næmingar skulu hava sítt egna "headsett" við.
- Næmingar, sum hava brúk fyri at lána "headsett" frá skúlanum, skulu boða frá á skrivstovuni í seinasta lagi hósdagin 4. mai 2023, kl.12.
- Næmingurin kann brúka teldutøkar orðabøkur, sum t.d. www.sprotin.fo

**Fimisrokning**
- Royndirnar verða gjørdar á skulatelduni hjá næminginum, sum teir hava við í skúla
- Í fimisrokning verður dentur lagdur á høvuðrokning. Ikki er loyvt at nýta roknimaskinu og heldur ikki forrit á telduni, sum kunnu nýtast sum roknimaskinur.
- Loyvt er at nýta bókina ”Støddfrøði – handbók”.

**Greiðslurokning - verður gjørd á pappíri!**
Her verður dentur lagdur á tað, ið vanliga verður nevnt ”problemrokning”. Her má næmingurin í størri mun skilja uppgávuna, finna upplýsingar til spurningarnar og loysa teir. Loysnin kann ikki standa einsamøll, men ein frágreiðing má vera, ið vísir, hvussu næmingurin er komin fram til loysnina. Í greiðslurokning roknar næmingurin fyrst á kladdu, síðani verða uppgávurnar førdar inn við penni. Tekningar kunnu tó gerast við blýanti.

<u>Amboð at hava við til royndina í greiðslurokning eru</u>:
- Blýantur
- Pennur
- Viskileður
- Linial
- Passari
- Vinkulmátari
- Tríkantur
- Roknimaskina
- ”Støddfrøði – handbók”
- Bøkur og annað tilfar úr undirvísingini